# Ársins nýggi bólkur

planet.fo Awards



**Heiðrik**
Heiðrik hevur í vetur víst, at hann er ein óvanliga gávuríkur sangari og sangskrivari.
Hansara egna slag av elektroniskum tónleiki er smittandi, fangandi og lokkandi. Heiðrik við øðrum orðum er eitt frískligt og nýskapandi lot innan føroyska tónleikaheimin.
Stakfløgan hjá Heiðriki Jealous, kom út herfyri og vísir, at her er talan um eitt heilt serligt talent. Røddin er framúrskarandi, og tað er eingin ivi um, at hetta er eitt sera spennandi íkast til føroyskan tónleik, ið vit fara at hoyra nógv frá komandi árini.



**Lizzie**
24 ára gamla Ann Elisabeth Berg hevur lagt danska poppheimin fyri sínar føtur við stóra hittinum Ramt i Natten
Eitt tað mest spennandi nýggja navnið í danska tónleikaheiminum í 2007 er Lizzie. Navnið kom burtur úr ongum, men eftir stuttari tíð hevði eitt stórt radiohitt slóðað fyri Lizzie. Tað er 24 ára gamla Ann Elisabeth Berg, sum hevur vunnið upp á tónatindarnar í Danmark undir navninum Lizzie, og her heima hevur sangurin Ramt i Natten eisini verið nógv spældur. Lizzie hevur verið virkin í tónleiki, síðani hon var smágenta. Hon hevur sungið í kóri, spælt í ymsum bólkum, og í Danmark hevur hon eisini roynt seg sum sangara – millum annað í eini duett við Alex í fjør.
Fyrsta stakfløgan hjá Lizzie gjørdist eitt stórt hitt í Danmark, og nú verður bíðað eftir, at Lizzie fer at koma við sínari fyrstu fløguútgávu næsta ár.



**Petur Háberg**
Petur Háberg flutti seg í ár, frá at vera trubadurur til at vera rokksangari í sínum egna rokkbólki .
Á Asfalt, G!, Summarfestivalinum og Fjarðafestivalinum spældi bólkurin eitt slag av progressivum nútíðarpoppi, sum leiddi tankarnar til bólkar sum Carpark North, men eisini til íslendska popp gandakallin Mugison. Søta røddin hjá Peturi stendur øgiliga væl til hart rokkandi tónleikin. Men tað er heldur ikki at forkasta, at Petur er ein sangari, sum er ómetaliga sjarmerandi, hann dugur væl at vinna hjørtu, vælklæddur, penur og gjøgnumført fittur



**The Carlsens**
Hóast tær ikki hava verið at sæð á føroyskum palli, so hava The Carlsens verið millum virknastu nýggju tónleikanøvnini.
Carlsen systrarnar, Vanja, Laila og Barbara hava alt árið ferðast kring USA við prædikumanninum Rodney Howard-Browne og kirkjuni The Revival Ministry. Men samstundis hava tær tikið sær tíð til, at spæla inn eina fløgu. Sum er útkomin í USA og Føroyum. Hóast tær allar hava verið vikrnar á tónleikapallinum í nógv ár, so er hetta fyrsta útgávan hjá teimum saman. Tær hava javnan verið at sjónvarpsrásum sum GOD TV og CTN har fleiri milliónir hyggjarar hava hoyrt tær sungið



**The Ghost**
The Ghost er eitt av teimum mest spennandi nøvnunum á føroyska tónleikapallinum.
Bólkurin gjørdi fyrstu ferð vart við seg á eini konsert í Losjuni við Gøtugjógv, og hevur síðan spælt nógv. M.a. sluppu teir við á Iceland Airwaves festivalin.
Tónleikurin er eitt slag av elektroniskum poppi. Hann er minimalistiskur, rútmiskur og egin; ein samanseting av elektroniskum rútmum og hondspældum gittara og synthesizara. Konsertirnar eru sera lívligar, serliga er sangarin Filip Mortensen sum ein sekkur av loppum. Hin helvtin av The Ghost er Urbanus Olsen.



# Ársins útlendska navn



Tilnevning besti útlendski: Bjørk
»Declare Indenpendence!« útkom sum eitt brak og sum eingin annar, enn hon kann tað, so hevur hon hugtikið lurtarar kring allan heimin. Útgávan »Volta« hevur hugtikið fleiri ummælarar og hevur hon fingið góð ummæli. Fyrrnevnda staklag er, sum hon hevur sagt á konsertum og greitt frá fyri altjóða fjølmiðlum, ognað Føroyum og Grønlandi. Og lagið snýr seg um at gerast sjálvstøðugur á ein og annan hátt.



Tilnevning besti útlendski: Bruce Springsteen
Hetta er ein gamal kenningur innan Rock/Pop-heimin. Miðskeiðis í 70unum fekk hann sítt gjøgnumbrot og í 80unum vann hann sær tað væl fortjenta eyknevnið »The Boss«. Springsteen er tó á ongan hátt pensjóneraður, nú vit skjótt skriva 2008. Í 2006 kom »We shall Overcome – The Seeger Sessions«. Av seinastu útgávu hansara frá 2007, »Magic«, er tað lagið »Radio Nowhere«, sum hevur ligið ovalaga á hittlistum kring heimin. Á fimtan teimum bestu hevur »Radio Nowhere« ligið ovast í meiri enn tveir mánaðir.



Tilnevning besti útlendski: Kent
Svenski bólkurin Kent er millum tilnevningarnar til ársins besta bólk/einstakling á Planet Awards. Bólkurin hevur síðan fyrstu fløguna í 1995 gjørt fleiri góð løg, ið lurtarar í hópatali hava tikið til sín. Hetta er eisini galdandi heima í Føroyum, har bólkurin ofta hevur haft løg inni á 15 Teimum Bestu. Bólkurin hevur nýliga útgivið fløguna »Tillbaka til Samtiden«.



Tilnevning besti útlendski: Nephew
Danski bólkurin Nephew hevur eitt serligt tilknýtið til føroysku lurtararnar. Bólkurin hevur jú vitjað tvær ferðir á G-Festivalinum. Og báðu undanfarnu árini varð Nephew valdur til ársins útlendska tónleikanavn á Planet Awards. Seinastu tíðina hevur ein live-útgáva av lagnum »Hospital« klintra uppeftir donskum hitlistum. Hetta lagið er av konsertfilminum »07.07.07«, sum bólkurin nýliga hevur útgivið.



Tilnevning besti útlendski: Timbaland
Alt, ið hesin rørir ,ið tykist gerast til gull. Produsarin Timbaland hevur m.a. givið Nephew eina hjálpandi hond og eisini Bjørk, sum bæði eru tilnevnd undir besta útlendska bólki ella einstaklingi á Planet Awards. Hitt sum »Promiscuous« hjá Nelly Furtado og »Sexyback« hjá Justin Timberlake eru millum hansara kendastu. Í løtuni arbeiðir hann saman við Madonnu, ið gevur fløgu út fyrst í 2008.

# Ársins songkvinna



**Eivør Pálsdóttir**
Eivør Pálsdóttir hevur møguleikan at vinna planetina fyri bestu songkvinnu triðja árið á rað.
Eivør Pálsdóttir gav í ár fløgu út, innspælda í Írlandi við írskum topptónleikarum, men hesir eru bara karmur um stjørnuna, ið er røddin hjá Eivør. Eingin føroysk songrødd hevur fingið so nógv góð orð frá ummælarum um allan heim. Farna árið hevur hon ferðast kring heimin og sungið í nógvum ymiskum samanhangum. Men eisini her heima hava vit kunna uppliva røddina. Eitt nú á konsertini á Atlantic Music Event í Norðurlandahúsinum, ein framførsla, ið telist millum tær bestu á føroyskari jørð nakrantíð.



**Guðrið Hansdóttir**
Guðrið Hansdóttir hevur eina av teimum bestu røddunum í Føroyum, og er í ár veruliga traðka fram í rampuljósið.
Guðrið er einasta kvinna, umframt Lenu og Eivør, ið hevur verið í uppskoti til hesa heiðursløn á hvørjum ári.
Eftir fleiri ár sum einstaklingur við gittara, og í bólkum sum PH 5,5 og Isadora & The Rebels, er Guðrið nú oddakvinna í einum bólki, ið spælir undir hennara navni. Úrslitið hava flest øll hoyrt: eian fløgu, ið fólk hava tikið til sín, og sum letur eyðkendu røddina hjá Guðrið koma til sín rætt.



**Laila Carlsen**
Laila Carlsen hevur í nógv ár sungið, í ár hevur hon valt sangin sum yrkisveg, og syngur kring alt USA.
Laila Carlsen hevur verið virkin á føroyska tónleikapallinum í nógv ár, men tað er ikki fyrr enn seinasta árið, at hon hevur arbeitt fulla tíð sum songkvinna.
Laila er saman við systrunum Vanju og Barbaru flutt til USA, har tær syngja fyri The Revival Ministry. Á teirra fyrstu fløgu, ið var givin út undir heitinum The Carlsens og á God Channel, har tær javnan syngja, kunnu føroyingar tó frøðast um vøkru røddina hjá Lailu.



**Lena Anderssen**
Lena Anderssen er aftur í ár millum nøvnini, ið eru í uppskoti til heiðurin besta songkvinna, og við eini fløgu, har songrøddin veruliga sleppur til sín rætt, er hetta rættiliga sjálvsagt.
Røddin hjá Lenu er framúrskarandi, hon hevur ferð eftir ferð prógva, at hon telist millum tær bestu songkvinnurnar, ið vit hava. Hon hevur í størri mun enn nøkur onnur føroysk songkvinna lært seg at brúka sítt ljóðføri á mest áhugaverdan hátt. Tað ger heldur einki, at Lena við tíðini er vorðin somikið dugnaligur yrkjari, at røddin hevur inniligan boðskap at bera, tí tað er sum søgusigari, at Lena er allar sterkast..



**Sigrid Rasmussen**
Songkvinnan, sum stórtívist í gospeltónleiki, hugtekur ferð eftir ferð við síni framúr góðu rødd
Sigrid Rasmussen hevur nakað yvir sær, sum fáar aðrar songkvinnur her á landi hava. Vakra songkvinnan hevur eina framúr góða rødd, og tá ið hon fer á pallin er ein altjóða dámur yvir henni.
Hon kann syngja gospel, so tað stendur eftir, og tá ið hon fer í holt við aðrar sjangrur kann staðfestast, at hon eisini kann syngja popp ella jazz, skuldi tað verið.
Sigrid Rasmussen hevur áður verið poppstjøran í Noregi, og hon hevur eisini gingið á tónlistaskúla í London. Nú er hon heima í Føroyum, og tað hevur við sær, at hon er oftari at hoyra til tiltøk, enn hon onkuntíð hevur verið. Og tað kunnu føroysku oyruni njóta gott av.

planet.fo Awards